## Stjórnin hevði vunnið

Var altingsval í Íslandi nú, hevði verandi stjórn varðveitt meirilutan. Ein kanning, sum Capacent Gallup hevur gjørt fyri Morgunblaðið, vísir, at Samfylkingin hjá Jóhonnu Sigurðardóttir, forsætisráðharra hevði fingið 31,1 prosent av atkvøðunum, og at hin stjórnarflokkurin, Vinstri Grønir, hevði fingið 24,6 prosent. Hetta úrslitið hevði givið Samfylkingini 21 tingmenn og VG 16 ella tilsamans 67. Av hinum flokkunum hevði Sjálfstæðisflokkurin fingið 26,2 prosent og 17 tingmenn, Framsóknarflokkurin 12 prosent og átta tingmenn, og Frælslynti flokkurin hevði fingið eitt umboð í Altingið.

## Evran hevði gagnað Svøríki

Svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, heldur, at búskapargongdin í Svøríki ta seinastu tíðina hevur víst, at Svøríki eigur at fáa sær evruna til gjaldoyra. Tað segði hann við tíðindafólk í Reykjavík í gjár, har teir norðurlendsku stjórnarleiðararnir hava hildið fund. Fredrik Reinfeldt vísti á, at sviar vrakaðu evruna á fólkaatkvøðu í 1993, og at tað hevur verið politisk semja um at útseta spurningin til 2014. Meiningakanningar hava víst, at tey flestu hava verið ímóti at taka evruna ístaðin fyri krónuna, men at munurin hevur verið minkandi.

# Avhoyra fólk í Facebookmálinum

**Facebook hevur fylt rættiliga nógv í blaðnum seinastu tíðina, og í dag kann løgreglan upplýsa, at hon hevur havt tvey fólk inni til avhoyringar, so tað verður ikki leingi, til málið verður loyst frá teirra síðu**




*Líkt er til, at fólkini, ið hava gjørt ólógligar gerðir við Facebook og øðrum miðlum, er heilt nær við at verða handtikin*

INTERNET MISBRÚK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í vikuni hevur Sosialurin gjørt rættiliga nógv burturúr heimasíðuni Facebook og øðrum háttum at loypa á fólk við tøkni.

Serliga eitt ávíst mál hevur fylt nógv, og nú veit løgreglan at siga, at teir hava havt fólk inni til avhoyringar.

- Vit hava havt tveir persónar inni til avhoyringar, sigur Bergleif Brimvík, kriminalovasti.

### Skjótt arbeiði

Í samband við hetta mál er løgreglan eisini løgd undir at arbeiða seint, men hetta heldur hann ikki vera rætt.

- Málið varð fráboðað í januar. Vit hava gjørt kanningar í málinum, og hava eisini fingið teir viðkomandi upplýsingarnar frá telefyritøkuni, so vit nú hava havt tvey fólk til avhoyringar. So eg haldi ikki, at mann á nakran hátt kann siga at borið hevur verið seint at, staðfestir kriminalovasti. Hann leggur afturat, at teir sjálvandi skulu hava ein rættarúrskur fyri at gera tílíkar kanningar, og hendan hava teir longu nýtt.

So staðfestast kann, at nú restar lítið í, at brotsfólkini í Facebook málinum verða handtikin.

### Fólk kunnu hjálpa

Í sokallaða Facebookmálinum hevur Theodor Joensen gjørt nakrar kanningar sjálvur, og hetta heldur løgreglan vera gott.

- Tað sígur seg sjálvt, at betri eitt mál verður lýst, betri er tað, staðfestir Bergleif Brimvík. Hann leggur tó afturat, at tað er sera týdningarmikið, at fólk ikki bróta nakrar lógir, um tey gera tílíkar kanningar.

### Tíðindi gera mun

Gjøgnum vikuna hevur Sosialurin gjørt nógv burturúr hesum málið. Mikudagin greiddu tvey fólk frá, at teirra telda varð nýtt í málinum, og í gjár greiddi Theodor Olsen frá hansara søgu, at familja hansara hevur verið fyri ágangi, og at hann sjálvur hevur gjørt kanningar í málinum.

- Tað er gott at pressan tekur tílík mál upp, serliga parturin við fyribyrgjandi arbeiði gjøgnum dátueftirlitið, sigur Bergleif Brimvík. Hann leggur tó somuleiðis dent á, at tað ikki er altíð, at ein viðgerð í fjølmiðlunum hjálpir eini sak, tí tað kann eisini vera hinvegin.

- Í júst hesi sakini hava fjølmiðlarnir tó ikki gjørt nakran mun, sigur kriminalovastin.

# Brandurin í bilinum í Kvívík kannaður

**Fyri tíð síðan kom eldur í ein bil í Kvívík. Tá eldurin var sløktur, varð ein eldri maður funnin deyður í bilinum Deyðsorsøkin er tó ikki nakað politiið upplýsir, men orsøkin til brandin er funnin, og hendingarnar er greiðar**

BILBRANDUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað var 16. februar, at ein eldri maður í Kvívík varð funnin deyður í bilinum hjá sær á einum parkeringsplássi í bygdini. Løgreglan hevur nú kannað málið og er komin fram til, at maðurin fyrst fekk eitt dánilsi, og síðani kom eldur í bilin.

- Tað, sum hendir, er, at maðurin fær eitt dánilsi. Meðan maðurin er uttan vit heldur hann á spitaranuim í bilinum, og hetta hevur við sær, at sera høgir umdraðingar eru á motorinum í bilinum, sum hevði eina ringa forbrenning, staðfestir Bergleif Brimvík, kriminalovasti.

Tað, sum sambært løgregluni síðani hendi, var, at eldur kom í útstoyti á bilinum. Skitna forbrenningin hevði við sær, at bensin samlaðist í pottinum á útstoytinum, og hesin brast eftir stuttari tíð. So skjótt hetta er hent, kom eldur undir bilin. Eldurin breiddist skjótt, og sera nógvur hiti var.

Eftir stuttari tíð kom eldurin upp ígjøgnum dúrkið á bilinum, og tá eldurin festi í setur og so framvegis, so brendi heilt skjótt.

Hetta sampakkar alt við fyrstu eygleiðingarnar av bilinum, har fólk sóu, at eldurin var kyknaður har afturi.

Bergleif Brimvík leggur afturat, at deyðsorsøkin hjá manninum verður ongantíð almenn, men at dánilsi hjá manninum sjálvandi hevur havt við sær, at hann ikki kundi koma út bilinum.



*Nú er staðfest, hví eldur kom í hendan bilin í Kvívík tann 16. februar í ár*